HEILSANIR

Góði Búgvi
Hjartaliga tillukku á 18 ára degnum. Eisini ein heilsam til hinar sum fylla 14. og 26. sept. og 13. okt. Jesus pápi signi framtíð tykkara,
Omma og abbi

Elisa og Edvard Ingebrigtsen
Góðu foreldur og verforeldur. Hjartaliga tillukku við føðingardøgunum 9. og 15. sept. Góðan túr til DK. Gleða okkum til ballið.
Heilsan Hanna og Erland

Góði abbi
Hjartaliga tillukku við 48 ára føðingardegnum 8. september. Eisini ein heilsan til ommu. Eg elski tykkum.
Heilsan lítla Annie

Góði Búgvi
Hjartaliga tillukku á 18 ára degnum. Jesus pápi signi framtíð tína. Gleða okkum til tú kemur til DK við bili.
Mamma, babba, Bogi og Teresa

Góða elskaða Rannvá
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við 6 ára føðingardegnum. Jesus pápi signi framtíð tína.
Ynskja mamma, babba og Ásbjørn

Góði elskaða Silja
Lukku og gleði á tínum 1 ára degi. Siggjast leygardagin. Jesus pápi signi framtíð tína.
Ynskja gubbi, omma og abbi

Hey øll tit sum vit kenna
Her er Ari. Hann verður 6 ár 9. sept. Hann bjóðar cacao, bollar og skattajakt. So komi bara. Muss og klemm.
Omma og abbi

Hey
Annar av hesum »skatarunum« hevur føðingardag. Tit kunnu sjálvi gita. TIllukku.
Sigmar og Tonga

Góðu Búgvi og Fróði
Hjartaliga tillukku við døgunum 9. og 14. sept. Nú verður stólurin skiftir út við bilin. Ansið eftir tykkum. Vit øll
Mostir

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. Sp/f 461, Sp/f Smoltaling, 350 Vestmanna.

Viðtøkur broyttar: 28.06.2004.
Nevnd:
Farin frá sum formaður: Jógvan Ziska Djurhuus, Peter Andersensvej 1, DK-9800 Hirtshals.
Farin úr nevndini: Suni Durhuus, Traðarvegur 19, 100 Tórshavn, Ola Holen, Nakkevegen 21, N-6014 Ålesund og André Flem, Las Magnolias 55 Parque Ivian, Pto Varas, Chile.
Innkomin í nevndina: Olaf Olsen, 625 Glyvrar (formaður), Óli M. Hansen, Skotarók 16, 100 Tórshavn.
Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Suni Durhuus, Traðarvegur 19, 100 Tórshavn.
Innkomin sum stjóri: Frímund Hansen, Spógvavegur 39, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur:
Felagið verður teknað av stjóra saman við nevndarformanninum, ella nevndarformanninum saman við einum nevndarlimi.
Endamál:
Endamál felagsins er at reka aling og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 8. september 2004

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 3048, P/F EmerKur, 497 Selatrað.

Viðtøkur broyttar: 28.06.2004.
Nevnd:
Farin úr nevndini: Bogi Nielsen, 530 Fuglafjørður (formaður), Suni Durhuus, Traðarvegur 19, 100 Tórshavn og Johan Nolsøe Djurhuus, Korkagøta 4, 100 Tórshavn.
Innkomin í nevndina: Olaf Olsen, 625 Glyvrar (formaður), Óli M. Hansen, Skotarók 16, 100 Tórshavn og Jógvan Ziska Djurhuus, Peter Andersensvej 1, DK-9800 Hirtshals.
Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Høgni Jacobsen, Mýrisnípuvegur 23, 100 Tórshavn.
Innkomin sum stjóri: Frímund Hansen, Spógvavegur 39, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur:
Felagið verður teknað av stjóra saman við nevndarformanninum, ella nevndarformanninum saman við einum nevndarlimi.
Endamál:
Endamál felagsins er at reka aling og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 8. september 2004

Kristin Balle

Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

5 ferðir um vikuna

Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag. ☐ Týsd. ☐ Mikud. ☐ Hósd. ☐ Fríggjad. ☐Leygard.

Tekstur:.....
.....
.....
.....
.....
.....

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).

Navn: .....
Bústaður: .....
Bygd/býur: ..... Tlf.: .....

Sendið lepan, mynd og gjald til:

Sosialurin

Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»Heilsanir«**

TILTØK

Sjómanskvinnuringurin í Havn
kemur saman á Sjómansheiminum mánadagin kl. 19.30. Allar kvinnur eru vælkomnar.

Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing. Kl. 11.30 Samvera við drekkamunni, kl. 12 Sunnudagsskúli og kl. 12 verður eiisni møti, har David Peckham úr Onglandi talar.

Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 20 Ungdómsmøti. Í morgin kl. 17 Landsbøn. Sunnudagin kl. 11 Sjónvarpsmøti saman við Evangeliihúsinum – Tummas Jacobsen talar, kl. 11.50 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Egin og Maritu Henriksen.
Mánadagin kl. 20 Felags bøn í Meinigheitini í Hoyvík.
Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067. Telefonin svarar mán-frí frá kl. 8-16.
www.filadelfia.fo

Missiónshúsið við Landavegin
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli í Býlingshúsinum á Norðasta Horni, kl. 18 Møti í Missiónshúsinum v/ Justines Poulsen.

Katólska Kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Tuomo Vimpari, prestur í Mariukirkjuni, kl. 14 Sunnudagsskúli.

Meinigheitin í Hoyvík
uppi á Brekku 3
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta v/ Jóhan P. Johannesen, kl. 14 Sunnudagsskúli. Mánakvøldið kl. 20 Felags bønarmøti.
Mikumorgun kl. 7 Bøn.
Lega verður vid Gjógv í dogunum 1.-3. okt.

Frá Ebenezer
Fríggjadagin kl. 20 Teen-Night.
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.

Lívdin
Í Hoyvíkar skúla
Sunnumorgunin kl. 10.30 á familjumøtinum talar Jógvan Zachariassen um evnið »Náði - partur 1«. Á tilbiðjanarmøtinum kl. 12 talar Absalon Ákargarð um evnið »Hirðatænstuna - partur 1«.
Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtinum.
Sunnudagsskúli kl. 12. Drekkamunnur er millum møtini.
www.livdin.fo

Frelsunarherurin, Tórsgøta 19
Sunnudagin kl. 11 Halgunarmøti, kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn, kl. 18 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.

Meinigheitshúsið
Fríggjakvøldið kl. 19.30-21.30 Juniorhugni, frá 5. flokki.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Niels Jacob Nielsen.

Kirkju- og Missiónshúsið á Argjum
Sunnudagin kl. 19 Møti v/ Jan Johannesen, Miðvágur.

Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

Vestmanna Missiónshús
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli. Onki møti vegna vikuskiftismøti í Kollafirði.

Saron, Vestmanna
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ breyðbróting við Eiler Johannesen. Verið hjartaliga vælkomin í Saron.

Miðvágs Missiónshús
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti í missiónshúskjallaranum. Hjartaliga vælkomin.

Zion, Kollafjørður
Ungdómsmøtini byrja aftur leygarkvøldið kl. 20, ung úr Havn luttaka. Drekkamuður verður aftaná. Øll eru vælkomin.

Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21 AWAKE, við ungdómsleiðslúni.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Paula Høj. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

Meinigheitshúsið á Skála
Leygarkvøldið kl. 20 verður Ungdómsmøti. Øll eru vælkomin.

Tofta missiónshús
Sunnudagin 12. september kl. 17 Familjumøti. Øll børn og vaksin eru vælkomin.
Innsavnað verður. Boðið verður til drekkamunn aftaná. Orsakað av hesum verður eingin sunnudagsskúli kl. 14.

Bønhúsið, Søldarfjørður
Sunnudagsskúli sum vant kl. 13.30. Á møtinum sunnukvøldið kl. 18 talar Marius Jacobsen, Leirvík. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Thabor, Fuglafjørður
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, har Vagn Foldbo talar. Ragnhard verður settur í starv. Drekkamuður aftaná.

Getsemane, Klaksvík
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 18 Møti.

Soli Deo Gloria
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ Jógvan Lamhauge og øðrum.

KFUM & K, Klaksvík
Fríggjakvøldið kl. 22 Opið hús.
Sunudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18 Møti við Karl Hendriksen, kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið í Skopun
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og lovsangsløta, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl 18 Møti. Bønarmøti hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið í Vági
Á sunnudagsskúlanum sunnudagin kl. 14 luttaka Thurid og Snorri Brend, trúboðarar í Mali. Á møtinum kl. 18 greiða tey bæði frá radio- og missiónsarbeiðinum millum fulani-fólkið í Mali. Innsavnað verður til missiónsarbeiðið. Øll eru vælkomin.

Frelsunarherurin, Vágur
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti. Bønarmøti hálvan tíma undan møtinum. Niels E. Olsen talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Zion, Vágur
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti.
Mánakvøldið kl. 21 Bønarmøti og bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

Læraranna Missións Felag
LMF-stevnan í ár verður á Hellunum leygardagin 25. sept. Byrjað verður kl. 9.00.

Samkoman Malta í DK
Leygarkvøldið 11.9. kl. 19 verður evangel. fundur í Skolehjemmet, Sønderlandevej 28.
Sunnukvøldið 12.9. kl. 17 verður evangel. fundur í Staldgårdsgade 4, Vejle. Talarar Levi Joensen og aðrir. Eftir fundin bjóða vit kaffi. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Mánadagin 6. september
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10-18 Myndaveving á loftinum. Seyma fýrkantar saman til teppir
kl. 14-18 Kortspæl, landastrok, bobbspæl, telving, dart og onnur spøl
Týsdagin 7. september
kl. 10-11.30 Vit syngja, Óli Vang. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15 Guðrun Haustein sigur frá um at vera ferðaleiðari
Mikudagin 8. september
kl. 10-17 Opið hús
kl. 14 Jákup Lindenskov sigur frá um Mullers pakkhús
kl. 15 Søluframsýning í Mullers pakkhúsi. Livandi verkstaðir (atgongd 50,-) Betta Johansen. Tilm. 316491
Hósdagin 9. september
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Teldupræt, Brandur Petersen
kl. 14-16 Boccia í kjallaranum
Fríggjadagin 10. september
kl. 10-17 Opið hús

Tað er altið ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Felagið Tórshavn – gongutúrur
Sunnudagin 12. september verður gongutúrur av Velbastað-Steinafjall-Havnardalar. Lættur túrur. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Bygdaleiðin fer frá Steinatúni kl. 10.30.
Tilmelding.

Gongutúrur úr Hvalba til Sandvíkar
verður leygardagin 11. september. Bussur koyrir av Kunningarstovuni í Vági kl. 10.00 og av Kunningarstovuni á Tvøroyri kl. 10.30. Aftaná gongutúrin verður farið í Bónahúsini við Ánna í Sandvík har fæst kaffi og okkurt afturvið. Síðani verður koyrt við bussi úr Sandvík til ávikavist Kunningarstovurnar á Tvøroyri og í Vági.
Tilmelding til túrin skal gerast á kunningarstovuni í Vági á tlf. 374342/284342 ella á kunningarstovuni á Tvøroyri tlf. 372480/284480 í seinasta lagi fríggjadagin kl. 16.00.

Tilhaldið Hugnin í Sandoy
byrjar aftur mikudagin 1. september til vanliga tið. Opið er frá kl. 14.00-17.00. Drekkamuður er at fáa. Bløðini eru til taks.

Dagtilhaldið í Vági
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

Vágs Pensionistafelag
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmoðrafelag.
Allir pensionistar og øll omanfyri 60 ár eru vælkomin. Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

Spælistovan í meinigheitshúsinum
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

Føroya Heimavirsfelag
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

AA-fundir í Havn
Tinghúsvegur 37
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15 Stóri bókafundur
Mikudag: kl. 20.00–21.00
Stiga- og siðafundur
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00 og kl. 22.30-23.30
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasiða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

NA (Anomymir narkomanar)
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

Al-Anon
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 16.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

Al-Anon í Vágum
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag siðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

AA í Vági
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

Blái Krossur – Glyvrar
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

Blái Krossur – Eiði
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

Fyribyrgingarráðið
Argjaboðagøta 7 · 160 Argir
postrúm 135 · 110 Tórshavn
tlf. 315155 · fax 320272
Teldupostadr.:
fyribyrg@fyribyrg.fo
heimasíða: fyribyrg.fo

Náttarravnarnir í Tórshavn
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr.
Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

Lymfødemfelagið
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutið. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

Heilafelagið
Íslandsvegur 10 · tlf. 317373
T-post: heilaf@post.olivant.fo
Nærri upplýsingar, eisini við ráðgeving, finst á heimasíðuni: www.mbf.fo undir »Um MBF«.

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Sveriki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894.
Fø. Sparikassi 442027-8.

Føroyskir Mærsk Siglarar
Grønlandsvegur 58, 100 Tórshavn
Frítíðarfelag, hvørs endamál er at røkja áhugamál hjá teimum føroyingum, ið starvast hjá A. P. Møller – Mærsk A/S. Tilmeldingarskjal fæst við at venda sær til felagið á tlf. 590100 ella um teldupost: aldebaran@kallnet.fo

Parkinsonfelagið
MBF-húsið, Íslandsvegur 10C
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Kristinu, tlf. 317317.

Javni
Hoydalsvegur 40 · 3 hædd
Vit hava eisini eina heimasíðu: www.javni.fo og t-post adressu: javni@post.olivant.fo har tit altið eru vælkomin at senda spurningar ella viðmerkingar.

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

Føroya Astma/Allergifelag
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c, Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: hvønn hósdag kl. 16.30-18.

Deyvafelag Føroya
Íslandsvegur 10B
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 317597, fartlf. 222381, skrivitlf. 316929 · fax 313609 og teldupostadr. deaf@deaf.fo heimasíðan: www.deaf.fo

Felagið fyri lesi- og skriviveik
Postadr.: MBF-Húsið
Íslandsvegur 10c
Endamál felagsins er at hjálpa teimumið hava lesi- og skrivitrupulleikar.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð men samband fæst við felagið á tlf. 441541, Anne Karin Kjeld og 318867, Laila Egholm.

Giktafelag Føroya
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Opið er týs- og hósdag frá kl. 13.00-16.00.
Tlf. 310237. www.gikt.fo
T-postur: gikt@gikt.fo

Føroya Felag Móti Krabbameini
Grønlandsvegur 58, Tórshavn
Telefontíð mánadag til fríggjadag frá kl. 13-15.
Tlf. 317959.
Teldupost: ftk@post.olivant.fo
www.ftk.fo